almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo



# Almannastovan søkir starvsfólk

## Leiðari til Veitingardeildina

Nú leiðarin á Veitingardeildini hevur fingið aðrar avbjóðingar á Almannastovuni, søkja vit eftir einum nýggjum leiðara til Veitingardeildina.
Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi, avbjóðandi og sera fjølbroytt starv í einum góðum arbeiðsumhvørvi, har tú verður við í framhaldandi menningini av Almannastovuni og hevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Sum leiðari á Veitingardeildini hevur tú ábyrgdina av øllum veitingum innan fólkapensjón, fyritíðarpensjón, sjúkradagpening, barnagjald, stuðul til uppihaldspening o.a.
Harumframt hevur tú ábyrgdina av menningini av øllum starvsfólkunum á deildini.

Les meir um starvið á *www.almannastovan.fo*

## Samskipari innan leiðslu og kunning

Søkt verður eftir samskipara innan leiðslu og kunning til stjóraskrivstovuna á Almannastovuni at byrja skjótast til ber.
Á Stjóraskrivstovuni eru tveir samskiparar, ið arbeiða tætt saman. Okkara ynski er, at tú hevur politiskt og fyriskipanarligt tev, og ert virkin og nýhugsandi, hevur góð samstarvsevni og kanst arbeiða sjálvstøðugt við at loysa uppgávur í samsvari við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar, stovnurin hevur.

Starvið er skipað við beinleiðis tilvísing til stjóran, og samskiparin er, saman við hinum samskiparanum, við til at skipa arbeiðið.

Les meir um starvið á *www.almannastovan.fo*

ENDURLÝSING

## Starvsfólkaleiðari

Almannastovan er stovnur í støðugari menning og sum alla tíðina skal laga seg til krøv frá tí politiska myndugleikanum og samfelagnum annars.
Endamálið er, at viðskiftafólk okkara til eina og hvørja tíð skulu kenna seg væl og fáa eina professionella tænastu. Skulu vit røkka tí málinum, er neyðugt, at vit hava starvsfólk, sum eru útbúgvingarliga væl fyri og eisini trívast í gerandisdegnum. Okkum tørvar eitt fólk, sum burturav kann taka sær av hesi uppgávu.

Les meir um starvið á *www.almannastovan.fo*

ENDURLÝSING

## KT-starvsfólk til Vitanardeildina

Í sambandi við at Almannastovan í næstum fer undir ta størstu almennu KT-verkætlanina nakrantíð í Føroyum, verður søkt eftir KT-starvsfólki til Vitanardeildina á Almannastovuni. Til fyrra part av KT-verkætlanini - ið væntandi fer at fevna yvir tvey ár - eru játtaðar 15 milliónir krónur. Eftir ætlan verður farið undir seinna part í 2009/2010, ið somuleiðis væntast at fevna yvir tvey ár.

Sum KT-starvsfólk verður tú partur av einum KT-bólki, sum komandi tíðina kemur at arbeiða við kravfesting, prosessoptimering, design o.ø. Umframt hetta kemur tú at taka lut í øðrum uppgávum á Vitanardeildini.

Les meir um starvið á *www.almannastovan.fo*

*Umsóknir til øll størvini við CV, avriti av prógvum v.m. skulu vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 26. oktober 2007 kl. 12.00.*

*Send umsóknina til:*

Almannastovan
Smyrilsvegur 20
Postboks 3096
110 Tórshavn

KREA.FO